NSÍ–B68:

Æran stendur upp á spæl

Kappingarárið hjá NSÍ er væl eydnað, og hjá toftamonnum verður sigur á grannunum plástur á vónbrotið, sum hetta árið hevur verið

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Á Toftum var talan um satt drama, tá B68 og NSÍ spældu, og væntandi verður spenningurin ikki minni, nú NSÍ framvegis spælir fyri sínum møguleika

Inntil fyri tveimum vikum síðani var NSÍ oddalið. Um tað hevði havt gingið eftir vild hjá teimum, so hevði dysturin ímóti B68 í morgin verið næstsíðsta stigið ímóti fyrsta FM heitinum. Soleiðis tørnaði tað ikki út. NSÍ tapti ímóti HB, og hóast møguleikin spøkir, at HB so at siga skal detta um beinini á sær sjálvum ímóti EB/Streymi í morgin, so verður í Runavík ikki roknað við øðrum realistiskum møguleika, enn at HB verður meistari, og at NSÍ og KÍ skulu stríðast um silvurmerkini.

Tað, sum fyri tveimum vikum síðani sá út til at gerast framúr kappingarár hjá NSÍ, verður kortini ikki mett sum miseydnað. Við sigrinum í steypakappingini hevur liðið fyri fyrstu ferð spælt seg í UEFA Cup, og teir vinna ivaleyst fyri fyrstu ferð nakrantíð heiðursmerkir.

– Nú taka vit eina uppgávu í senn. Ímóti B68 verður tað ivaleysa streivið, og tað er í hvussu so er greitt, at vit mugu arbeiða nógv fyri at fáa øll stigini, staðfestir Jógvan Martin Olsen, toftamaðurin og fyrrverandi B68 spælarin, sum er venjari í Runavík.

Hjá NSÍ tykist kappingarárið vera liðugt hjá Ulrik Balling. Eftir týdningarmikla málið í steypafinaluni gjørdist hann ódrúgvur í landskappingini. Skaði í lærkrikanum hevur havt við sær, at hann als ikki hevur vant síðstu meiri enn fjúrtan dagarnar. Hinir NSÍ spælararnir verða allir tøkir í morgin.

Plástrið

Tá NSÍ var á Toftum var talan um satt drama. Dysturin endaði 1–1, eftir at B68 var komið framum, og í síðstu løtu var um reppið, at NSÍ fekk øll stigini. Men B68 málverjin bjargaði brotssparkinum hjá Sjúrði Jacobsen. Hevði NSÍ havt fingið mál uppá brotssparkið, so høvdu teir nú havt eins nógv stig sum oddaliðið HB!

Sum seinni partur av kappingarárinum er liðin, og tað er vorðið alt meiri greitt, at B68 ikki fór at verða partur av tí kappingini, sum tað undan summarsteðginum sá út til, so hevur ofta verið tikið til, at ein sigur í Runavík kundi verið gott plástur upp á sárið.

Nú er tann stundin komin til handa hjá toftamonnum. Men hóast teir vunnu sannførandi á VB, so kunnu teir avgjørt ikki metast at vera favorittar hesa ferð. Seinnu árini hevur tað verið torført hjá B68 í Runavík, og NSÍ avrikini síðani summarsteðgin hava verið væl betri enn tey hjá B68.

Hjá B68 er kappingarárið liðugt hjá Jan Petersen, sum hevur trupulleikar við hælsinuni. Fríðin Ziskason verður ikki við í morgin. Hann er leikbannaður eftir tvey gul kort og harvið útvísing longu í 1. hálvleiki ímóti VB.

VB–KÍ:

Báðir partar eru við at pakka saman

Hesa seinastu vikuna hava venjingarnar í Klaksvík og í Vági ikki verið so títtar, sum tær annars hava verið í ár

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Klaksvíkingar fara til Vágs í morgin. Teir fara sjálvandi suður fyri at vinna, og teir siga, at tað er týdningarmikið, at teir greiða sín setning. Men teir tykjast hava ásannað, at hóast tað nógvu teir seinastu dystirnar hevur gingið sera væl, so verður heildarúrtøkan ikki meiri enn silvurmerkini. Tað er ikki so galið, men hjá so sigursvandum felag sum KÍ er tað ikki tað besta og serliga ikki, tá havt verður í huga, at teir í løtuni kanska eiga besta liðið av øllum.

At FM stríðið tykist vera avgjørt, og at spælararnir eru troyttir av longum kappingarári man vera orsøkin til, at Kurt Mørkøre ikki hevur lagt so nógv á sínar spælarar í hesi vikuni. Teir vandu týskvøldið og hóskvøldið, og so verður ikki vant meiri, áðrenn teir fara til Vágs.

Ove Nysted hevur í miðverjuni verið ein av størstu stuðlunum í hesum kappingarárinum. Men hann verður ikki við í Vági í morgin. Ove er annar av venjarunum hjá kvinnuliðnum, sum í hesi vikuni er í Umeå í Svøríki og spælir í Europa Cup bólkaumfari. Og umframt at vera burturstaddur, so er Ove eisini leikbannaður. Ímóti GÍ fekk hann triðja gula kortið í landskappingini.

Alexander Djordjevic hevur verið burturstaddur í vikuni. Hann skuldi koma aftur undan vikuskiftinum, og hann verður ivaleyst annar av miðverjunum. Avloysarin hjá Ova Nysted verður veteranurin Jan Andreasen ella Símun Joensen, sum loysti Alexander av, tá KÍ vann í Klaksvík ímóti HB.

Farnir í hi

Á Svangaskarði síðsta sunnudag vístu vágbingar, at teir meiri ella minni eru givnir fyri hetta árið. Teir hava ikki vant nakað serligt síðstu vikurnar. Í felagnum hava teir prioriterað liðið í 2. deild høgt. Nú er tann bjargingarroyndin eydnast, og so er møguleiki fyri, at teir fara at seta meiri fólk á besta liðið, sum var heilt illa mannað á Toftum.

Predrag Zivkovic noyddist út á Svangaskarði, tí hann var skaddur. Tað er rættuliga ivasamt, um hann verður við í morgin.

Tað hevur ljóðað, at onkrir av veteranunum á VB liðnum ætla at gevast í 1. deild, tá hetta kappingarárið er liðugt. Nú skal ansast eftir, tí tað vísir seg ofta, at ætlanir um heystið vísa verða veruleiki, tá dagarnir aftur fara at dragna. Men um vágbingarnir gera álvara av hóttanunum, so verður dysturin ímóti KÍ síðsti heimadysturin yvirhøvur hjá teimum í bestu deildini.

Um fótbóltsframtíðin í Vági skal metast út frá avrikunum í dreingjadeildini og unglingadeildini, so stendur ikki so illa til. Bæði liðini hava tryggjað sær FM heitið.

Til Rumenia í dag

U–17 landsliðið fer í dag av landinum. Leiðin gongur til Rumenia, har liðið skal spæla í EM undankappingarumfari. Hini liðini í bólkinum eru Rumenia, Makedonia og Eysturríki.

Bill Jacobsen, venjari, roknar við, at dystirnir ímóti Rumenia og Eysturríki vera rættuliga torførir, og at mótstøðan ímóti Makedonia eisini fer at verða ivaleysa stór.

Føroyska ferðalagið fer úr Vagum fyrrapartin. Í Keypmannahavn koma fimm spælarar uppí. Teir spæla í donskum feløgum.

jh

Lítil munur á málmi niðurflyting

Undan síðsta umfarinum í næstbestu deildini er tað tættari, enn tað nakrantíð hevur verið áður

2. DEILD
Jóannes Hansen

Átjanda og síðsta umfarið í næstbestu deildini er á skránni seinnapartin í dag. Tað er fyri langari tíð síðani greitt, at FS Vágar hevur vunnið deildina og harvið hevur tryggjað sær pláss í bestu deildini, eftir at teir bara hetta eina árið hava verið í 2. deild.

Men burtursæð frá fyrsta plássinum og gullkrónunum, so er tað mesta púra opið. Frá B36, sum er triði fremst og til NSÍ, sum undan síðsta umfarinum er næstaftast og harvið á plássinum, sum ber endaspæl um rættin at halda fram í deildini við sær, eru tað fimm stig.

B71, B36 og ÍF stríðast um silvurkrónurnar, og B71 og ÍF stríðast um rættin at spæla um eitt pláss í 1. deild. ÍF eigur torføru uppgávuna í dag. Teir skulu á heimavølli spæla ímóti oddaliðnum FS Vágum, meðan B71 á pappírinum eigur lættari mótstøðuliðið. Teir skulu á heimavølli spæla ímóti VB. Vágbingar tóktust eftir fyrsta stóra triðingin av kappingini at vera vónleyst aftastir, men síðan hevur gingið so mikið væl, at tað skal vilja illa til, um VB flytur beinleiðis niður.

HB er aftast, og teir skulu spæla í Klaksvík. Um HB framvegis skal eiga lið í næstbestu deildini, so skulu teir vinna trý stig í Klaksvík. Og so mugu teir vóna, at Sumba vinnur øll stigini ímóti NSÍ. Um úrslitini laga seg soleiðis í dag, so verður tað NSÍ, sum flytur niður.

Um HB vinnur í Klaksvík og NSÍ vinnur í Sumba, so verða tað sumbingar, sum flyta beinleiðis niður. Tá fara bæði HB og Sumba at hava 21 stig. Tey standa á jøvnum í innanhýsis uppgerðum. Sumba vann 2-1 í Gundadali, og HB vann 5-1 suðuri á Krossinum. Tað eru bara stigini, sum telja í innanhýsis rokningini. Um tað stendur á jøvnum í innanhýsis rokningini, so verður hugt at málmuninum, og har er HB betri enn Sumba. Undan síðsta umfarinum hevur HB -2 í málmuni, og Sumba hevur -15.

LÍF er fjórði aftast. Teir skulu spæla í Gundadali ímóti B36, sum er á silvurkós. Men sjálvt um leirvíkingar skuldu snáva í dag, so kunnu teir ikki flyta niður. Tað gera innanhýsis dysturin millum Sumba og NSÍ og lutfalsliga góði málmunurin hjá LÍF. Um LÍF og Sumba skuldu enda á sama stigatali, so er LÍF betri. Liðini hava vunnið hvønn sín innanhýsis dyst, men LÍF hevur +2 í málum, meðan Sumba hevur -15.

KÍ og VB hava møguleika at røkka heiðursmerkjum. Klaksvíkingar skulu vinna á HB, og so skulu ÍF og B36 tapa. Um tað lagar seg soleiðis, so vinnur KÍ í hvussu so er bronsu. Hjá VB er treytin, at teir vinna á Sandi, og at ÍF og B36 tapa ímóti ávikavist FS Vágum og LÍF, og at KÍ tapir á heimavølli ímóti HB.

Nú skulu tær hava mótstøðu

VÍF er aftur favorittur, men í mun til undanfarin ár tykjast fleiri av hinum liðunum at leggja enn meira fyri í royndunum at taka gullið

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Um vikuskiftið verður sjøtul settur á hondbóltslandskappingina í kvinnuhondbólti, og tó at kappingin í ár tykist vera meira spennandi enn í fjør, so hevur hon so avgjørt sínar skuggasíður.

Fyri at taka tað fyrsta fyrst, so eru útlit fyri, at kappingin hjá kvinnunum í ár kann gerast meira spennandi, enn hon hevur verið tey bæði seinnu árini, har VÍF hevur havt í serflokki sterkasta liðið í landinum.

Ikki tí. VÍF er í útgangsstøðnum aftur í ár at meta sum favorittur. Tær hava framvegis tríggjar framúr góðar útlendingar á liðnum, og nógvir av leikarunum eru tær somu, men hinvegin er breiddin í hópinum sera lítil, og hetta kann geva trupulleikar, um skaðar fara at raka liðið. Av liðnum frá í fjør eru farnar Randi Kúrberg og Jórun Ludvig, men hinvegin er Hertha Simonsen komin úr Sóljuni, og tað kann gerast sera spennandi at síggja, hvussu hon fer at trívast, nú talan verður um hondbólt í ovasta liðnum, heldur enn at stríðast um tilveruna í bestu deildini.

Umframt tær tríggjar útlendsku, so hevur liðið framvegis tær báðar fyrrverandi StÍF-kvinnurnar, Alis Høghamar og Sóleyð Mikkelsen. Sóleyð hevur seinnu árini verið millum avgjørt bestu leikararnar í landinum, og einki er at siga til, at tað er gleðiligt fyri VÍF, at hon hevur gjørt av at taka eitt tørn afturat við koyritúrum mest sum hvørt kvøld. Eisini Alis hevur drúgvar royndir, men í mun til í fjør verður hon mest sum einsamøll um at halda plássið á strikuni, og hetta kann gerast ein møtumikil uppgáva.

Havnin hóttir

Skal ein hóttan móti VÍF koma, so er eftir øllum sólartekin greitt, at hendan í ár skal koma úr Havnini. Her hava tær út Neistnaum tey bæði seinnu árini verið mest sum einsamallar um at verja borg í tvey ár, men í ár er líkt til, at Kyndil vil rætta upp upp á støðuna, sum mest sum gjørdist katastrofal í fjør, tá tað ikki var fyrr enn í næst seinasta dystinum, at liðið tryggjaði sær tilveruna í bestu deildini.

Á leikarasíðuni tykist Kyndil at standa seg væl sterkari í ár, enn tær gjørdu í fjør. Bulurin á liðnum er framvegis hin sami, og so hartil hevur liðið fingið tilgongd av fleiri spennandi leikarum. Ikki minst verður spennandi at síggja, hvussu evnini hjá Lotte Sørensen kunnu gagnnýtast, nú hon í Ileanu Manolescu og Anniku Thomsen hevur fingið tveir viðleikarar, sum kunnu vera ein stór hjálp sum ávíkavst skothóttan og spælskipari. Seinastu árini hava avrikini hjá Lotte verið merkt av, at ein ovurstór ábyrgd hevur liðið á herðum hennara, og kann hon finna stílin frá gullárunum aftur, er lítið at ivast í, at spælið hjá Kyndli kann lyftast við nógvum stigum. Hartil tykist Ann Hansen eisini hava betri stundir til hondbóltin í ár, og í fullari venjing er hon avgjørdur styrkur fyri eitt og hvørt lið í bæði áløps- og verjuspælinum.

Umframt hesar fær Kyndil ætlandi eisini styrk úr Jugoslavia, har ein fyrrverandi landsliðsleikari helst er ávegis til felagið, og fæst hendan nóg skjótt at rigga inn í heildarmyndina, er einki at ivast í, at Kyndil í útgangsstøðnum hevur eitt sera sterkt lið.

Í Neistanum er ætlanin enn einaferð at spæla við í oddinum, men í løtuni tykist eitt sindur ilt at meta um, hvussu væl tær eru fyri til kappingarárið. Ikki minst tí tríggjar av grundstuðlunum á liðnum, Katrin á Neystabø, Birita Wardum og Gunnleyg Berg, allar eru farnar av landinum í lestrarørindum. Hetta merkti, at nýtt fólk skal spælast inn í lykilaleiklutir, og tó at Neistin vanliga hevur møguleika at taka fleiri evnaríkar leikarar upp á besta liðið, og hevur fingið tilgongd av Simonu Dziugyte, Christinu Holm og Jórun Ludvig, so kann neyvan roknast við, at hesar alt fyri eitt eru førar fyri at lyfta liðið. Men so er fyrimunurin sjálvandi, at grundspæli bara telur hálvt, og at møguleikarnir tískil skuldi verið góðir at gjørt ein veruligan vørr í endaspælinum.

Tunt við fólkinum

Fyri hini fýra liðini í bestu kvinnudeildini tykist ein felagsnevnari at gera seg galdandi, og tað er, at tað tykist vera trupult at fáa nóg mikið av leikarum.

Serstakliga hava hesir trupulleikar verið sjónligir í Klaksvík, har tað enntá hevur verið tosað um at taka liðið úr kappingini, og hóast tað ikki gjørdist so heilt galið, so er málsetningurin hjá liðnum lækkaður nakað nógv. Størsta spurnarteknið í hesum tykist tó vera, hvussu nýggju útlendsku leikararnir rigga í liðnum, og um heilt væl vil til, er tað væl hugsandi, at liðið hóast alt fer at geva teimum í oddinum dygga mótstøðu.

Í Vági hava tey í fleiri ár verið við til at mynda ovaru hálvu í bestu deildini, og eitt nú hevur liðið veruliga sýnt tenn í steypakappingini, men enn hevur tað ikki eydnast at røkka avgjørda oddinum, og tað er nógv, sum bendir á, at hetta heldur ikki fer at eydnast hesaferð.

Av ymsum orsøkum eru fleiri av leikarunum frá í fjør farnir burtur av leikarahópinum, og ikki minst man tað kennast tungt, at tær báðar, Rannvá Augustinussen og Gurið Mortensen í øllum førum ikki verða við í grundspælinum. Seinastu trý árini hevur VB umframt heimligu leikararnar eisini havt styrk úr Ungarn, men hetta er í ár skift um við Litava, har tríggir leikarar og ein venjari eru komin.

Eisini hjá StÍF verður roynt við nýggjum útlendskum kreftum í ár. Ileana Manolescu hevur í vetur gjørt av at spæla við Kyndli, men aftur fyri hana hevur StÍF fingið toppskjúttan hjá Sóljuni, Asta Petrauskiene, og hon hevur eisini fingið ein málverja við til Strendur, nú Ingun Mørkøre ikki verður tøk í ár.

Hartil skal eisini sigast, at hóast StÍF í fjør endaði langt burturi frá heiðursmerkjunum, so sýndi liðið góð evni í nógvum av dystunum, og megnar venjarin í ár at fáa hesi avrikini at gerast meira støðug, er einki at ivast í, at eisini tær kunnu vera við til at seta dám á kappingina í oddinum.

Sjeyndа liðið í ovastu deildini úr Runavík, og lítið er at ivast í, at teirra setningur fyrst og fremst verður at halda fast í sessinum í bestu deildini. Í mun til undanfarin ár hevur hópurin merkt nakað av frágongd undan vetrinum, og tað kann viðføra innanhýsis órógv fyrstu dystirnar. Bjargingin kann verða, at liðið aftur í ár hevur stórskjúttan, Militsu Ergic á liðnum, og einki er at ivast í, at hon saman við landskvinnuni, Lenku, verður tann, sum álitið skal setast á í royndunum at varðveita sessin í deildini.

Fyri VÍF vóru tað gleðiboð, tá Sóley Mikkelsen gjørdi av at taka eitt tørn afturat, og saman við liðfeløgunum fer hon nú eftir einum reinum hat-trick, har VÍF hevur møguleikan at taka triðja FM-heitið á rað

Heitastu avbjóðararnir hjá VÍF tykjast vera havnarfeløgini bæði, Neistin og Kyndil, sum bæði hava lagt nógv fyri í fyrireikingunum til kappingarárið